**Klaksvíkar Sjúkrahús søkir eftir einum dugnaligum og ágrýtnum starvsfólki til teknisku- og maskindeildina at byrja 1. desember 2022 ella eftir nærri avtalu.**

Hevur tú gott handalag, og ert tú til reiðar at nýta títt tekniska know-how? So er hetta møguliga eitt starv fyri teg.

**Um deildina**

Talan er um eitt spennandi fulltíðarstarv, har tú kemur út í allar krókar á sjúkrahúsinum. Tú kemur at fáa ein gerandisdag saman við nógvum dugnaligum starvsfólkum, sum hava starvast á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í mong ár. Uppgávurnar er nógvar og ymiskar, og kemur tú at loysa tær í einum tøttum samstarvi við tínar starvsfelagar.

Arbeiðsøkið hjá deildini er at tryggja dagliga raksturin og viðlíkahaldið av bygningum, bygningslutum og tekniskari útgerð. Harumframt tekur deildin sær av, at:

- Góðskutryggja maskinur og útgerð, umframt eftirlit við uttanhýsis serviceveitarar
- Viðlíkahalda og umvæla maskinur, el og útgerð av ymiskum slag
- Umsita og viðlíkahalda hitamiðstøðina, ventilatiónsskipan og luft-gassskipan
- Samskipa verkætlanir í sambandi við umvæling og nýgerð
- Ymiskt fyrifallandi arbeiði

**Tú ert:**

- Ábyrgdarfull(ur)
- Góðskutilvitað(ur)
- Samstarvssinnað(ur)
- Fíggjarliga umhugsin
- Dugir væl at skipa títt arbeiði og tína tíð
- Tolir at arbeiða undir trýsti
- Villig(ur) til at eftirútbúgva teg her í Føroyum og uttanlanda
- Villig(ur) til at ganga inn í tilkallivaktarskipan

**Førleikar:**

- Góðar tekniskar førleikar
- Góðar praktiskar royndir
- Góðar royndir við samskipan av verkætlanum
- Koyrikort

Klaksvíkar Sjúkrahús brúkar CTS Stýrisskipan.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Regin Olsen, leiðara á telefon 214480.

**Umsókn** við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal sendast til: umsokn@ks.fo

Umsóknarfreistin er sunnudagin 25. september 2022.

Vit gleða okkum at móttaka tína umsókn.